# 150 atgongumerki eftir til Planet Awards

**Enn eru nøkur atgongumerki eftir til frálíka Gallakvøldið við góðum mati og framúrskarandi tónleiki á Hotel Føroyum.**



*Petsi Tvørfoss fer at syngja nøkur løg á Planet Awards, hon er harumframt í uppskoti til planetina fyri bestu songkvinnu.*

NIELS UNI DAM
*nielsuni@sosialurin.fo*

Nú eina viku undan Planet Awards eru 150 atgongumerki eftir til hetta stórsligna tiltak. Við framførslum við bólkum sum 200, Marius, Yggdrasil við Kára Sverrisyni, Channe Nussbaum Trio, Brandi K. Jacobsen, Petsi Tvørfoss, 200, Terja Rasmussen umframt Frændum, ið spæla til dans aftan á, at Planetirnar eru avgreiddar, er longu greitt, at hetta fer at verða ein av ársins størstu tónleikaupplivingum. Men enn er eitt stórt tónleikanavn, ið ikki er avdúkað.

## Simon Kvamm kemur

Á Planet Awards verða heiðurslønir handaðar til tað besta innan føroyskan tónleik, umframt heiðurslønina til besta útlendska bólk. Allir útlendsku bólkarnir, sum eru í uppskoti til hesa Planet, eru bodnir við, tað liggur tíanverri ikki fyri hjá Tim Christensen og James Blunt at koma, men Simon Kvamm úr Nephew kemur. Enn hava hvørki Madonna ella Green Day meldða avboð. Tað er eisini greitt, Jepser Binzer úr D.A.D. fer at handa eina Planet. Bæði Jesper og Simon gleða seg so nógv til tiltakið, at teir koma heilt til Føroyar í hesum ørindum. Um tú ikki hevur tryggjað tær atgongumerki enn, so er um at skunda sær, meðan nøkur eru eftir. Atgongumerkini fáast í forsølu í Teleshop, á Hotel Føroyum og í Miðlahúsinum í Vágsbotni, kostnaður er 275 kr. fyri alt tiltakið.

## Hvat er Galla?

Nógv fólk ringja okkum og spyrja, hvat tey skulu fara í. Galla konseptið á tiltakinum er fyrst og fremst gjørt fyri at fólk skulu pynta seg. Hetta nýtist ikki at vera í dýrum nýggjum klæðum sniðgivnum til hetta tiltakið, sjálvt um tað eisini er ok, Men talan kann gott vera vanlig pen klæðir, ella kanska okkurt heilt annarleiðis, spennandi vakurt ella sermerkt. Í vikuni fara vit í Sosialinum, at vísa nøkur dømi um hvussu hetta kann gerast.

## Stílfullir karmar

Við fyrimyndum úr tiltøkum uttanlanda, er talan um eitt stílfult tiltak. Karmarnir, ið Hotel Føroyar veitur, eru frálíkir, og íroknað í atgongumerkið er matur og vælkomudrykkur. Talan verður um góðan lættan hotel mat, ið framúrskarandi góði køkurin á Hotel Føroyum stendur fyri. 18 ára aldursmark er á tiltakinum. Planet Awards byrja kl. 21.00 og væntandi fer Frændur á pallin at spæla til dans kl. 01.00.

## Eitt uppiborið herðaklapp

Føroyskur tónleikur hevur ment seg sera nógv seinastu árini, og hann hevur uppiborið at verða heiðraður. Hetta er ein roynd at geva hesum ídnaði, ið gevur føroyingum so nógv, eitt væl uppiborið herðaklapp.

## Enn kann atkvøðast

Enn ber til at atkvøða um hvør skal vinna heiðurslønirnar. Hetta verður gjørt við SMS boðum. Hvørt SMS boð telur sum ein lutaseðil um frálíkar vinningar, sum ferð fyri tvey við Atlantic Airways, eina Samsung E-730 fartelefon og eitt árshald av Sosialinum. Øll við fartelefonhaldi hjá Føroya Tele kunnu atkvøða við at senda eini SMS boð til 1441. Atkvøðast kann bert einaferð fyri hvønn flokk. Kostnaðurin fyri hvørja atkvøðu er 5,- kr + vanligt SMS gjald. Seinasta freist at atkvøða er hóskvøldið á miðnátt.

Óli P 70 ár

Móttøka í Miðlahúsinum



Í sambandi við at Óli P verður 70 ár týsdagin 24. januar verður móttøka í Miðlahúsinum henda dagin frá kl. 15 til 18.

Øll eru vælkomin

miðlahúsið
í Vágsbotni

## Ver við til at velja vinnararnar

Øll fartelefonhald hjá Føroya Tele kunnu luttaka í atkvøðugreiðsluni, um hvør skal fáa planetirnar. Hvør atkvøða kostar 5 kr. SMS atkvøðurnar telja helmingin av endaliga úrslitinum. Til ber at atkvøða einaferð innan hvørja kategori fyri hvørja fartelefon.

Tú atkvøður við at senda eitt SMS til 1441. Hvør atkvøða telur sum ein lutaseðil í kappingini um eina ferð fyri tvey á rutunetinum hjá Atlantic Airways, eina Samsung E 730 fartelefon, og eitt árshald av Sosialinum. Nøvnini á vinnarunum verða kunngjørd á Galla veitsluni og løgd á heimasíðuna planet.fo sama kvøld. Tey verða somuleiðis prentaði í Sosialinum mánadagin 30. januar.

**Besta útgáva**
A Place to Stand On – Deja Vu:
**send til 1441: pla bu 1**
Førist – Páll Finnur Páll:
**send til 1441: pla bu 2**
Koma – Petur Pólson:
**send til 1441: pla bu 3**
Morning Dew – Høgni Lisberg:
**send til 1441: pla bu 4**
Viva La Republica – 200:
**send til 1441: pla bu 5**

**Besti føroyski (bólkur/einstaklingur)**
200:
**send til 1441: pla bf 1**
Go Go Blues:
**send til 1441: pla bf 2**
Lama Sea:
**send til 1441: pla bf 3**
Makrel:
**send til 1441: pla bf 4**
Marius:
**send til 1441: pla bf 5**

**Besti sangari**
Brandur Karlson Jacobsen:
**send til 1441: pla bs 1**
Janus Rasmussen:
**send til 1441: pla bs 2**
Kári Sverrisson:
**send til 1441: pla bs 3**
Kim Hansen:
**send til 1441: pla bs 4**
Teitur Lassen:
**send til 1441: pla bs 5**

**Besta songkvinna**
Eivør Pállsdóttir:
**send til 1441: pla bk 1**
Guðrið Hansen:
**send til 1441: pla bk 2**
Guðrun Sólja Jacobsen:
**send til 1441: pla bk 3**
Lena:
**send til 1441: pla bk 4**
Petsi Tvørfoss:
**send til 1441: pla bk 5**

**Besti nýggi (bólkur/einstaklingur)**
Lama Sea:
**send til 1441: pla bn 1**
Marius:
**send til 1441: pla bn 2**
Petur Pólson:
**send til 1441: pla bn 3**
Poppkorn:
**send til 1441: pla bn 4**
The Dreams:
**send til 1441: pla bn 5**

**Besti útlendski (bólkur/einstaklingur)**
Green Day:
**send til 1441: pla ub 1**
James Blunt:
**send til 1441: pla ub 2**
Madonna:
**send til 1441: pla ub 3**
Nephew:
**send til 1441: pla ub 4**
Tim Christensen:
**send til 1441: pla ub 5**

FØROYA TELE